


**Nr. 15** *19. juli 2026* **86. árg.**

# Aldri neyðstadda barn sítt hann sveik

Ein kona bar fram ein vitnisburð niðri á gomlu Blákross kaféini. Hon greiddi frá, hvussu Harrin hevði hjálpt sær, tá ið hon var í dýrastu, dýrastu neyð. Yngri sonur hennara plagdi at drekka. Ein dagin merkti hon, at slíkur ófriður var á honum, og mamman grunaði beinanvegin, at nú var tostin komin á hann aftur.

So fór drongurin út, og mamman fekk einki gjørt. So leingi, børnini eru smá, kanst tú leiða tey, tá tey gerast vaksin, mást tú sleppa teimum, tá velja tey sjálv. Men tú kanst leggja tey í eina hægri hond, Guds hond, og tann hondin svíkur ongantíð.

Mamman fór upp á loft og legði seg á knæ. Hon rópti til Guds og bað hann hjálpa sær. Hon var í ordiligari neyð.

Tveir tímar seinni kom sonurin heim, púra edrúur „Mamma, tú hevur biðið fyri mær," segði hann.

„Ja, góði, tað havi eg."

„Ja, tað skilti eg. Eg fór oman í Rúsuna at keypa mær eina brennivínsfløsku. Eg vildi ikki koma heim at drekka hana, tí eg vildi ikki særa teg. So sat eg úti og drakk hana, alla sum hon var. Men eg kundi eins væl havt drukkið vatn, tí hon ávirkaði meg púrt einki."

Hjá Gudi er als einki ógjørligt. Halt á at biðja, svarið er ávegis. Hesin sonurin hevur nú verið turrlagdur í 12 ár.

\- - - -

Handa vitnisburðin bar eg fram nú eitt kvøldið á nýggju Blákross kaféini. Tá reisti ein maður seg upp og segði: „Eg vitnaði í áðni, men kann eg sleppa at siga eitt afturat? Hatta, sum handa

konan vitnaði um, fekk meg at hugsa um ein líknandi tilburð. Tað sótu 4 menn við eitt borð og drukku. Tríggir høvdu stíva kenning, men tann eini var turra edrúur. „Hvat bagir tær?“ spurdu hinir. Tá rópti hin edrúi: „Tað er mamma, sum liggur á knæ heima og biður fyri mær, tí rínur tað ikki við!!!“

*Effie Campbell.*

# Hvat sløkkir sálartostan?

Tað var Moody, sum í einum av bókum sínum segði, at blakar tú ein neva av saguspønum út í tún, so er tað ikki ein fuglur, sum so mikið sum skeitir at teimum, men blakar tú ein neva av molum, so eru smáfuglarnir har beinanvegin og eta teir upp.

Tá ið vit hugsa um andaliga føði, so kennir eitt satt Guds barn munin á heimsins saguspønum og breyðinum, sum kom niður av himli, Jesus Kristus. Hansara orð er hitt einasta, sum kann sløkkja ta tystu sálina. Drekk ikki úr heimsins runuhyljum, men fyll teg við tí klára, reina kelduvatninum, sum Jesus hevur at geva tær, orð sítt.

Alt summarið á tamb eru verðslig tiltøk um vikuskiftini, ja, bæði tvey og trý ymisk eru at velja í. Men tá ið larmurin og gangurin eru tagnað, slóknar gleðin eisini, tí gleði er ikki at finna í larmi. Føroyska orðið stuttleiki sigur alt: tað er ein stuttur leikur.

Nei, Jesus hevur ta ektaðu vøruna at bjóða, hann fyllir lívið við meining og innihaldi. Tá ið vit taka ímóti honum í trúgv og bjóða honum inn í okkara hjarta, so gevur hann okkum syndafyrigeving, eitt ævigt lív, frið og ta sonnu gleðina.

Hann er Vegurin, Sannleikin og Lívið. Eingin kann ogna sær alt hetta uttan at geva seg yvir til Jesus. Hann bíðar eftir tær og vil tær alt tað besta.

*Effie Campbell.*

Tað er eins og yvir um deyðans sund
alt tíðari vinirnir fara,
og eftir vit sita við sorg í lund
og sakna ein burtfluttan skara.
Tess longur várt æviskeið er á jørð,
tess vissari sorgin og tregin,
og vinafjøldin skjótt handan fjørð
gerst størri enn hesumegin.

*Petur Háberg, eldri.*

# Hvat eiga vit at læra av Hauge?

Harald Flem hevur gjørt ein film um Hans Nielsen Hauge, nú tað eru meir enn 200 ár síðani, at hesin merkismaður doyði.

Vekingin, sum kom við Hauge, hevði ikki komið, um tey, sum hann møtti, ikki høvdu deilt Orðið í heimum sínum. Hann dugdi ómetaliga væl at tvinna trúgv sína inn í gerandisdagin. Fólk arbeiddu um dagin á gørðunum, men á kvøldi tóku tey sær stundir til Orðið.

Tað vanliga kristna lívið tá fataði um: breyð, brøðraskap og Bíbliu. So eg hugsi, at vit mugu hava hetta sjónarmiðið og fáa tað at hanga saman í gerandisdegnum, og at skráin ikki bara verður henda, at vit arbeiða frá mánadegi til leygardag og fara so í kirkju sunnudag. Tað, sum hann lutaði við fólk, var slíkt, sum var frammi í tíðini.

Nú er tørvurin ein heilt annar enn fyri 200 árum síðani. Hauge hevði eyguni eftir menniskjum kring seg, og tað er tað, vit eisini mugu gera, síggja tørvin, sum fólk hava nú. Vit skulu ikki kopiera eina veking, sum var fyrr, men greina tíðina, vit liva í og ikki linka um boðskapin, vit bera.

Harald Flem sigur: „Vit hava t.d. tey seinastu 10 árini havt ein ómetaligan tørv á at draga fólk inn í sjálvan kirkjubygningin, meðan Hauge fór út, har fólk vóru. Vit fáa ofta eina betri samrøðu um lívið á sofuni hjá grannanum enn á kirkjubeinkinum. Nógv gransking vísir, at tað ikki fyrst og fremst er teologiin, sum ger, at fólk rýma úr kirkjuni, men tey sakna felagsskapin, og har er kirkjubygningurin kanska ikki tann best egnaði.

*„Troens Bevis“ – Effie Campbell* umsetti.

# Maðurin, sum lá í koma

Terje Liverød, sum í mong ár hevur arbeitt fyri Harran í Egyptalandi og í Miðeystri, var á Visjon Norge, har teir høvdu samrøðu við hann.

Har greiddi hann frá einum trúgvandi norðmanni, sum skuldi fara til Teilands at evangelisera. Flogfarið datt niður. Hesin maðurin varð í skundi koyrdur til eitt sjúkrahús í Bangkok, har hann lá í óviti, í koma.

Ein vinmaður hansara sms-aði til meinigheitirnar í Noregi og bað tær fara í bøn fyri honum, so hann skuldi vakna við

aftur. Tað gingu nakrir dagar, so svaraði ein maður í Noregi áheitanini soleiðis: „Harrin hevur talað til mín og givið mær ein boðskap. Hann sigur, at maðurin, sum liggur í koma, skal blíva grøddur og koma til lívs aftur. Hann skal blíva grøddur við hvítusunnukraftini. Harrin sigur, at hetta, sum er hent, er eitt tekin. Eins og maðurin liggur í koma, soleiðis liggur eisini norska kirkjan í koma. Men hon skal rakna við aftur eins og hesin maður, og tað skal eisini verða við hvítusunnukraftini."

Dagarnir gingu, og fólk vóru ómetaliga spent uppá, um hann nú vildi rakna við aftur á hvítusunnu. Men tá ið farið var um midnátt hvítusunnudag í Bangkok, var einki hent. Tey stóðu undrandi, til ein segði: „Ja, men hvítusunnan er ikki av yviri í Noregi, teir eru fleiri tímar aftan á okkum."

Og so var, tá ið tað gjørdist midnátt í Noregi, kom eitt bjart ljós inn í sjúkrarúmið og fylti tað, og maðurin settist upp undir seg, og nú eru vit serliga spent uppá, at veking skal koma í Noregi, tí Harrin hevur sagt, at tað, sum hendi við manninum, var eitt tekin upp á norsku kirkjuna, endaði Terji Liverød.

*Effie Campbell.*

---

Tá ið tú boðar, at fólk verða frelst av náði og ikki við gerningum, mást tú ikki gloyma, at frelsandi trúgv altíð verður sett í verk við góðum gerningum. Trúgv er frelsunnar rót; men góðar gerðir og blíðskapur er frelsunnar frukt og „... tí av fruktini man træið kennast." Matt. 12,33.

*e.c.* ums.

---

Gud hevur eina ætlan um vøkstur hjá kirkju síni, og tú ert ein partur av hesi ætlan. Tú ert kallaður at bjóða fólki til gudstænastu. So sigur tú kanska: „Er tað ikki uppgávan hjá presti?" Nei, hann er hirði. Hirðar føða ikki lomb, tað gera seyðirnir. Nær hevur tú síðst tikið onkran við í kirkju?"

*e.c.* ums.

---

**Ógift konufólk:** Eg vil heldur vera einsamøll enn saman við onkrum, sum vil, at eg skal vera øðrvísi. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 16** ***2. august 2026*** **86. árg.**

# JESUS LEITAÐI UPP OG FRELSTI TEY GLATAÐU

*Moses Hansen*

Vit liva í einari ógvisligari tíð, men tað gjørdi Jesus eisini. Hitt harðrenda Rómaríkið hevði valdið. Hugsa um Heródes, sum sendi hermenn til Betlehems at drepa øll dreingjabørn frá tveimum árum og niður eftir.

Tá ið Heródes hevði føðingardag, fekk kona hansara tað hugskotið, at hon vildi hava Jóhannes doyparan hálshøgdan og høvur hansara sett á borðið á einum fati – mitt undir veitsluni. Og tað fekk hon. Jesus livdi í einari harðrendari og óndari tíð. Samstundis varð Hann spiltur út, spottaður og jagstraður av tátíðar jødisku oddamonnunum – nøkur fá undantøk vóru tó. At enda varð Hann háðaður og sligin við koyrli og krossfestur saman við tveimum brotsmonnum.

Mitt í øllum óndskapinum og myrkrinum misti Jesus ongantíð málið úr eygsjón. Hansara kall stendur stutt skrivað í Lukas 19,10: „Menniskjusonurin er komin at **LEITA UPP** og **FRELSA** tey **GLATAÐU**.“

Gert Grube hevur skrivað eina bøn um hetta við vøkrum og sterkum orðum – eina bøn, sum tú og eg lættliga kunnu gera til okkara egnu:

„Harri, tú ert komin at **LEITA UPP** og **FRELSA** tey **GLATAÐU**. Harri, eg geri tíni orð til mína bøn.

**LEITA UPP** og frels tey menniskju, sum burturvilst vála um og ikki kunnu finna hvílu.

**LEITA UPP** tey menniskju, sum eru sovnað vegna materialismu og annað, sum tey eru bundin av.

**LEITA UPP** og frelst tey menniskju, sum eru bundin til eina sjúkrasong og fegin vilja fara á føtur.

**LEITA UPP** tey menniskju, sum hava mist hugin at liva.

**LEITA UPP** og frelst tey menniskju, sum ikki **LEITA** teg **UPP**. Harri, **LEITA** tey **UPP**, men ger tað varisliga sum ein pápi hevði møtt barni sínum. Vek tey, meðan tað enn er náðitíð. Vís teimum tær naglamerktu hendurnar, møt teimum við kalli tínum. Skapa ein hungur og tosta eftir egna Orði tínum, leið tey aftur til tær gomlu gøturnar. Harri, ger tað júst nú.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tættast við ævinleikan

Eg las einaferð í Kirkeklokken um eina konu, sum bað nógv. Ein dagin sigur Harrin við hana: „Tú skalt biðja hesa bønina: Harri, frels tann, sum er tættast við ævinleikan!"

Eg veit um onkran í Føroyum, sum biður soleiðis: „Harri, frels tey, sum fara at doyggja í dag!"

*e.c.*

# Gud kundi svara kortini

Konuna, sum greiðir frá, havi eg kent, síðani vit vóru smágentur. **Hon sigur soleiðis:**

Eg hoyri upp í tann bólkin, sum onga mammu átti. Hon doyði, tá ið eg var 3 ár. So fingu vit eina húshaldirsku; men hon doyði, tá ið eg var 9 ár. So blivu vit einsamøll í húsi, og eg lærdi at gera alt sjálv og bleiv ógvuliga sjálvbjargin.

Í 2002 setti eg meg eitt kvøldið at slappa av og hyggja at sjónvarpi, áðrenn eg skuldi á kvøldvakt. Tað var sendingin „Horvin". Tað var um eina gentu, sum leitaði eftir mammu síni. Eg sløkti so fyri sjónvarpinum, tá ið sendingin var liðug, og eg var rættiliga kedd. Eg hugsaði: „Ja, tú fanst so mammu tína aftur og kanst tosa við hana og spyrja hana, men tað kann eg ongantíð."

Tað er so nógv við mær, sum eg ikki veit, hví eg eri soleiðis. Vanliga havi eg stutt fjús, men tá ið tað av sonnum leikar á, eri eg so rólig.

Eg fari so yvir til bókahillina og taki í onkra bók uttan at hugsa um, hvørja bók eg taki. Tá er tað poesibókin hjá mammu. Eg lati hana upp bara onkrastaðni. Tá komi eg niður á eina síðu, sum er so tjúkk. Eg helt meg vita, hvat ið stóð á øllum

síðum, men hetta hevði eg ikki ansað eftir fyrr. Hetta vóru tvær síður, sum vóru klistraðar saman.

„Hvat er hetta?“ hugsaði eg, tá ið eg fekk tær sundur, „hvat havi eg skrivað her?“ Nú er tað so, at skriftin hjá mær og mammu er heilt líkar. Tað var hon, sum hevði skrivað hesar báðar síðurnar í 1932, og 70 ár seinni sleppi eg at lesa tað. Mamma var trúgvandi. Hon skrivar, hvussu týdningarmikið tað er at halda seg til Jesus, altíð at fyrigeva øðrum av hjarta og ikki at ganga runt og tosa negativt og slatra. Tað er sum at sita við einum kodda í fanginum og stinga hol á hann. So flúgva allir fjarðarnir úr, og tað er heilt ógjørligt at samla allar aftur, soleiðis er tað við slatri. Eg bleiv so glað fyri hetta. Tað var, sum Gud segði: „Nú skalt tú sleppa at kenna nakrar av tonkunum hjá mammu tínari.“

Gud er góður. Hann sær inn í hjartað og lesur tankar okkara. Hann sá, hvat ið hjarta mítt tráaði eftir, og 70 ár frammanundan hevði hann fingið mammu at skriva hetta niður, og nú, tá ið mær tørvaði tað, stýrdi hann mínum fetum yvir til bókahillina, har eg fekk fatur júst á teirri røttu bókini og uppdagaði, at tvey bløð vóru klistrað saman. Tá ið eg við einum knívi varisliga fekk loyst síðurnar sundur, las eg hesi orðini, sum vóru balsam fyri sál mína.

*Effie Campbell.*

# Eg eri spentur

Ein trúgvandi norðmaður var farin inn á eitt sjúkrahús at vitja ein vinmann sín. Hesin vinmaðurin var júst skurðviðgjørdur. Hann hevði eina álvarsliga sjúku. Læknin kom inn til hansara og segði, sum var: „Tú hevur bara nakrar heilt fáar mánaðir eftir at liva í.“ So fór læknin, og sjúkrarøktarfrøðingurin kom inn og spurdi: „Hvussu tekur tú hetta, sum læknin segði við teg? Ert tú ikki bangin, stúrir tú ikki?“

„Nei, eg gleði meg. Eg eri so spentur. Veitst tú, eg eri trúgvandi, og Jesus mín Frelsari hevur sagt, at hann fór undan mær at fyrireika mær ein bústað, og tá bústaður mín er liðugur, skal hann koma eftir mær. So nú eri eg so spentur at sleppa at síggja bústaðin. Hann er næstan liðugur, tað manglar bara okkurt smávegis, so kemur Jesus og tekur meg heim.“

*Effie Campbell.*

# Her sært tú, hvat ið bíðar Guds børnum:

**Bak stjerners myriader**
Bak stjerners myriader jeg en herlig bolig har,
som Jesus Kristus nu bereder meg.
Og når den så er ferdig, jeg med glede den inntar.
Ved tanken nu mit hjerte fryder sig.

***Kor:***
*Tenk, snart så er jeg der bak himlens stjernehær*
*i hjemmet, som til evig tid består.*
*Jeg i de skjønne saler i den hvide drakten går.*
*Hvor skjønt å være der hvor Jesus er.*

Der kreves ingen leie, nei, der bor jeg fritt og godt,
min kjære frelser har jo alt betalt.
Ei noe mørke råder der i dette himmelslott.
Guds herlighet skal lyse over alt.

Jeg frykter ingen sykdom, der den ingen adgang får,
ei heller synd og død får komme inn.
Når jeg av nåde engang for min frelsers åsyn står,
er sidste tåre tørret av mitt kinn.

*Aage Samuelsen.*

---

**Ludvig Nessa, prestur í Noregi:** Í 2000 ár hevur kirkjan prædikað ***„syndernes forlatelse“*** og ikki ***„syndernes tillatelse“.*** Men nú er tað ein ela, ela lítil minniluti (1,2%), sum trýstir sína dagsskrá ígjøgnum. Tey 98% fáa eina lóg kroysta niður yvir seg. Tey skulu akta hana, og tey hava fingið munnkurv og hava ikki longur loyvi at siga sína hugsan, tí tað er revsivert. Kirkjunnar Harra, Jesus Kristus, hava tey skúgvað til viks og lítilsvert hann.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74